LIVERPOOL RAKAR STENGUR

Liverpool *hevur nú rakt stongina ella tvørstongina 17 ferðir í ár og tað meir enn nakar annar. Síðani 2008/09 hevur Liverpool 73 ferðir rakt stengurnar. Tað er 11 fleiri enn nummar tvey, Arsenal.*

TÍ VINNUR CITY

Tað er bara hent tríggjar ferðir, at eitt lið hevur fingið 40 stig í 16 teimum fyrstu dystinum. Hvørja ferð hevur tað liðið vunnið ***meistaraheitið****. Manchester United í 1993/94 og 2006/07, og Chelsea í 2005/06.*

PREMIER LEAGUE

ini rógva í takt

SILVA AVGJØRDI

Tað gjørdist David Silva, ið átti avgerandi fótin í dystinum millum Manchester City og Arsenal í gjár, tá hann skoraði einasta málið í dystinum, sum City vann 1-0

Mynd: Phil Noble/Polfoto

SKJÓTT MÁL

Ikki gingu meira enn 52 sekund, so hevði Wayne Rooney leygardagin sent Manchester United á sigurskós ímóti Queen's Park Rangers

Mynd: Kerim Okten/Polfoto

eru sett í samband við Chelsea eru brasiliumenninir, Neymar og Robinho.

Liverpool best á útivølli

Liverpool vann aftur hetta vikuskiftið á útivølli, hesa ferð á Villa Park. Liverpool var omaná frá byrjan og skoraði tvær ferðir upp á horna í fyrra hálvleiki. Fyrst var Craig Bellamy fyrstu á fimm metrinum og seinnu ferð stútaðu Martin Skrtel beinleiðis í mál.

Aston Villa er komið illa frá byrjan og fótbólturin er ikki á sama stigi, sum tá Martin O'Neill stóð á odda fyri liðnum. Tað skapti eisini øði millum Aston Villa viðhaldsfólkini, tá tað eftir dystin kom fram mynd, ið vísti Darren Bent keypa jólagávur meðan dystinum var. Enski landsliðsframherjin er skaddur í løtuni, men viðhaldsfólkini halda lítið um at hann ikki brúkti tíðina upp á stuðla sínum liðið heldur enn at keypa jólagávur.

Eftir dystin rósti Liverpool venjarin, Kenny Dalglish, Luis Suarez, sum hevur eina ákæru um rasistiskan málburð hangandi yvir høvdið. Rokna verður við, at at ein avgerð verður tikin í málinum áðrenn 20. desember. Luis Suarez er undir illgruna fyri at hava brúkt rasistiskan málburð mótvegis Patrice Evra, tá Liverpool og Manchester United brustu saman fyrr í ár.

Newcastle steðgað upp

Felagið hjá Jóan Símuni Edmundssyni tók tey flestu av bóli við at blanda seg millum topp liðini. Leygardagin megnaði liðið í hvítum og svørtum ikki at knekka eitt tamt Swansea lið. Newcastle royndi við Demba Ba á odda at fáa hol á, men Swansea helt fast.

Newcastle hevur nú bara fingið eitt stig út av tólv møguligum. Tað stigið kom tó móti Manchester United á Old Trafford. Venjarin hjá Newcastle, Alan Pardew, ásannai undan dystinum, at felagið má kempa fyri at halda fast í Cheik Tiote. Hóast hann hevur skriva langan sáttmála við felagið, so eru fleiri áhugaði í stríðsmanninum á miðvøllinum hjá Newcastle.

Botnurin

Bolton tapti aftur um vikuskiftið og liggur framvegis niðast við bara níggju stigum. Í fjør stóð Bolton seg væl og kom í hálvfinaluna í FA Cup. Hana taptu teir 5-0 móti Stoke og síðani hevur Bolton ikki verið at kenna aftur. Teir hava latið inn 38 mál og tað er meiri enn nakar annar. Bolton tapti um vikuskiftið 2-0 fyri Fulham.

Eisini Blackburn er í stórum trupulleikum. Viðhaldsfólkini hava leingi gjørt vart við sína ónøgd og vilja hava bæði venjara og eigarar frá. Steve Kean og hansara menn taptu 2-1 á heimavølli móti WBA.

Hesi bæði fáa tað torført við at halda sær í bestu deildini. Tað var eisini støðan hjá Wigan fyri trimum vikum síðani, men við sjey stigum í trimum dystinum er støðan hjá Wigan nú betra.

Í Premier League spæla teir við fullari ferð um jólini og longu í vikuni er fult umfar á skránni. Dystir verða týskvøldið, mikukvøldið og hóskvøldið. Størsti dysturin er óiva hóskvøldið tá Chelsea tekur ímóti Tottenham. Ein dystur, sum hevur stóran týdning fyri bæði liðini.

trondur@sosialurin.fo

Enska Barclays Premier League

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	MÁL	STIG
1	Manchester City	16	13	2	1	50-15	41
2	Manchester United	16	12	3	1	37-14	39
3	Tottenham	15	11	1	3	31-18	34
4	Chelsea	16	10	2	4	34-19	32
5	Arsenal	16	9	2	5	31-24	29
6	Liverpool	16	8	5	3	20-13	29
7	Newcastle	16	7	6	3	21-19	27
8	Stoke	16	7	3	6	18-25	24
9	Norwich	16	5	5	6	25-29	20
10	Aston Villa	16	4	7	5	18-21	19
11	Fulham	16	4	6	6	18-18	18
12	Swansea	16	4	6	6	16-20	18
13	West Bromwich	16	5	3	8	16-24	18
14	Everton	15	5	2	8	16-19	17
15	Queens Park Rangers	16	4	4	8	15-28	16
16	Sunderland	16	3	5	8	18-19	14
17	Wolverhampton	16	4	2	10	17-30	14
18	Wigan	16	3	4	9	15-30	13
19	Blackburn	16	2	4	10	23-36	10
20	Bolton	16	3	0	13	20-38	9